# Tunglyndi valdar í okkara fiskivinnu

**Seinnapartin seinasta fríggjadag skipaði Farec fyri ráðstevnu í útvarpshøllini um oljuprísir undir heitinum, "Oljuprísir – enn ein avbjóðing"**

SEMINAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað var Farec við Óla Samró, sum skipaði fyri seminarinum í útvarpshøllini fríggjadagin. – Livistøðið í Føroyum er á veg at lækka munandi – kanska niður í eina helvt av livistøðinum í eitt nú Íslandi og Danmark*
Mynd: Vilmund Jacobsen

Tað vóru búskaparfrøðingarnir, Óli Samró, sum stendur aftanfyri Farec, Teitur Poulsen, sum starvast hjá Faroe Petroleum og Magni Laksafoss, sum starvast við Fróðskaparsetur Føroya, ið viðgjørdu spurningin, hvussu oljuprísirnir kunnu ávirka fiskivinnuna og føroyska búskapin komandi árini.

Uppgávan hjá Teiti var at meta um útlitini fyri oljuprísunum í komandi tíðum og helt fyri, at samfelagið noyðist at laga seg eftir einum høgum oljukostnaði í framtíðini.

Í síni viðgerð lýsti hann útboð, eftirspurning og møguleikarnar at finna nýggjar keldur.

Óli Samró kom við sínum metingum um, hvussu oljuprísirnir fara at ávirka raksturin hjá føroyska fiskiskipaflotanum tey næstu árini, og við grundarlagi í dátugrunninum, "Nemo" og roknskapartølum fyri føroyska fiskiflotan gjørdi hann sínar metingar um úrslitini hjá ymisku veiðibólkunum.

Magni Laksafoss, sum í løtuni granskar sambandið millum oljuprísir og føroyskan búskap, metti um, hvussu oljuprísurin kemur at ávirka føroyska búskapin.

Eftir framløgurnar, hevði Hákun Djurhuus, stjóri á Shell, eina stutta frágreiðing um olju og oljuprísir, og síðan var orðaskifti við Hákuni Djurhuus, Bergi Poulsen, stjóra á Havsbrún og teimum, sum høvdu havt framløgurnar, við pallborðið.

Orðstýrari á fundinum var Jóhan Mortensen, útvarpsmaður.

### Lítil tillaging

Farec, sum skipaði fyri seminarinum, metir, at Føroyar ikki hava lagað seg eftir broyttu umstøðunum í heimssamfelagnum.

- Livistøðið er á veg at lækka munandi, kanska niður í eina helvt av tí í Íslandi og Danmark um fá ár.

Farec vísir á, at búskaparfrøðingar í nógv ár hava tosað um "tillagingar, men lítlar og ongar tillagingar eru hendar í nógv ár.

- Tey, sum ikki virka í vinnuni, síggja ongar tillagingar. Tey spyrja, hvar alternativini eru, og hví tey lærdu fólkini ongar tillaging fremja.

Farec heldur, at tunglyndi er yvir fiskivinnuni.

### Nýggj seminarrøð

Í vetur fer Farec undir eina nýggja seminarrøð, har spurningurin um tillaging verður viðgjørdur. Heitið á røðini verður: "Tillaging til heimssamfelagið - eitt gandaorð ella ein trongdur veruleiki".

- Løgmaður hevur sett eina 2015-ætlan út í kortið, har málið er, at Føroyar skulu í fremstu røð.

Farec fer at varpa ljós á ávirkanina, sum globaliseringin og broytingarnar í altjóða búskapinum hava á Føroyar.

- Hetta er ein stór avbjóðing, metir Farec.

Millum tey evni, sum verða viðgjørd á seminarunum í vetur, eru hesi:

- Hvat og hvørjum liva vit av nú – og hvørjum skulu vit liva av í framtíðini?
- Er fiskivinnan liðug?
- Hvussu fyribyrgja vit, at livistøðið í Føroyum verður helvtina av tí, tað er í Íslandi og Danmark?
- Er nakar møguleiki uttan fyri ES – og er EFTA loysnin?
- Hava fakfeløg ov stóra makt í mun til politikarar og vinnulívsfólk?
- Kann tann breiðkandi gjógvin millum samfelagsbólkar steðgast?
- Koma útlendingar at eiga enn meira av føroyskari vinnu?
- Hví hava føroysk virkir lítið og einki virksemið uttanfyri landoddarnar?

# Øktu oljuprísirn til vinnuna – me



*Í vetur fer Farec undir eina nýggja seminarrøð, har spurningurin um til-laging verður viðgjørdur. Heitið á røðini verður: "Tillaging til heimssamfelagið - eitt gandaorð ella ein trongdur veruleiki"*
Mynd: Jens Kristian Vang

**- Nei, eg haldi so avgjørt ikki, at tað bert er vinnan, sum eigur avbjóðingina við øktu oljuprísunum. Gongdin fer eisini at hava ávirkan á raksturin av almennum stovnum, bæði við dýrkandi olju og væntandi hægri elprísum sum frá líður**

OLJA OG ÁVIRKAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur, viðgjørdi í síni framløgu fyrst avleiðingarnar uttanlands av høgu oljuprísunum og nevndi, at inflatiónin í USA er við at veksa, at keypiorkan minkar og soleiðis eisini sølan, samstundis sum búskaparvøksturin minkar.

Hann nevndi eisini, at flogfeløg í USA eru farin í gjaldssteðg av hækkandi oljulprísunum.

Men tað eru eisini positivar avleiðingar av støðuni, og í hesum sambandi nevndi búskaparfrøðingurin, at stórar bíleggingar eru av eitt nú vindmyllum.

- Í Danmark siga tey, at høgir oljuprísir "ryster ikke supersund økonomi", legði hann aftrat.

Um avleiðingarnar av høgu oljuprísunum í Føroyum, segði búskaparfrøðingurin, at eitt vanligt



# nir ikki bara ein avbjóðing en eisini fyri tað almenna





húsarhald noyðist at gjalda einar 400-500 krónur meira á oljukontoina um mánðin, eins og væntandi er, at SEV fer at hækka el-prísin.

- Soleiðis, sum olju-og bensinprísirnir eru í dag, verður talan um ein øktan kostnað hjá hvørjum húsarhaldi upp á einar 6.000 krónur um árið til fýringsolju - og einar 3.000 krónur til bilin.

Búskaparfrøðingurin segði, at øktu útreiðslurnar fara at merkja minni tøkan pening hjá fólki.

*- Eg haldi ikki, at nakað bendir á, at samband er millum høgar ella lágar oljuprísir og fiskaprísirnar. Tað vísa søguligu tølini ikki, segði Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Men enn hava vit ikki sæð, at so er. Vit fara tó at síggja hetta, um oljuprísurin fer enn longur upp, legði hann aftrat.

## Bjarni fer skeivur

Magni helt ikki nógv um úttalilsini hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í bløðunum herfyri, tá ið hann segði, at tað er "vinnan, sum eigur avbjóðingarnar…"

- Eg haldi ikki, at øktu oljuprísirnir bert er ein spurningur, sum vinnan eigur at taka sum sína avbjóðing.

Hann segði, at við verandi gond mugu flestu vinnur rokna við hægri útreiðslum og minni eftirspurningi.

- Nei, eg haldi so avgjørt ikki, at tað bert er vinnan, sum eigur avbjóðingina við øktu oljuprísunum. Gongdin fer eisini at hava ávirkan á raksturin av almennum stovnum, bæði við dýrkandi olju og væntandi hægri el-prísum sum frá líður.

Magni væntar, at samlaða ávirkanin av øktu oljuprísunum kann gerast stór, bæði fyri vinnuna og fyri samfelagið sum heild.

- Eg vænti eisini, at hallið á fíggjarlógini fer at veksa, tí øktu oljuprísirnir raka føroyska samfelagið harðari enn aðrar búskapir, sigur hann.

## Tengt at oljuni

Á eini áhugaverdari talvu vísti hann á, hvussu danska orkunýtslan sær út – hvussu hon í prosentum býtir seg millum ymiskar orkukeldur.

- Danir eru ikki so heftir av oljuni sum vit. Av orkunýtsluni hjá dønum er bert 39% olja, 23% gass, 23% kol og 15% varandi orka.

Til samanburðar nevndi Magni, at av føroysku orkunýtsluni er 94% olja, 5% vatn og umleið 1% vindur.

- Hetta merkir, at vit eru rættiliga nógv bundin at oljuni, legði hann aftrat.

Magni vísti eisini á, hvussu samlaða orkunýtslan í Føroyum bítir seg í 2003-tølum:

- Av samlaðu nýtsluni brúkar fiskiflotin 43%, einstakir brúkarar og felagsskapir 17% - og síðan brúkar SEV hini 18%.

Búskaparfrøðingurin segði seg ikki ivast í, at SEV fer at hækka el-prísin, nú oljan er vorðin so dýr.

## Fiskaprísir fylgja ikki oljuprísunum

Magni vísti eisini á, at sambært hansara kanningum bendir einki á, at fiskaprísirnir fylgja oljuprísinum.

Hann nevndi tíðarskeið, tá ið oljan hevur verið dýr, men vísti samstundis á, at hetta ikki – av sær sjálvum – merkti, at fiskaprísirnir fór upp.

- Eg haldi ikki, at nakað bendir á, at samband er millum høgar ella lágar oljuprísir og fiskaprísirnar. Tað vísa søguligu tølini ikki, segði Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur.